# Býráðsfundur 25.09.2023

**<u>Býráðsfundur 25.09.2023 kl. 18.00</u>**

| | | |
|---|---|---|
| Fundarstað: | Fundarhølið | |
| Hjástødd: | Súni í Hjøllum, borgarstjóri | x |
| | Heini S. Kristiansen | x |
| | Høgni Hansen | x |
| | Elin á Torkilsheyggi | x |
| | Jan Højgaard | x |
| | Petur Jákup Petersen | x |
| | Rannvá í Túni Petersen | x |
| | Elsbet E. Magnussen, skrivari | x |

**<u>Mál til viðgerðar:</u>**

| | |
|---|---|
| Mál nr. 74/2023 – Eykajáttan til Heygsveg 2. viðgerð | ALMENT |
| Mál nr. 75/2023 – Fíggjarkarmurin hjá Nes kommunu 2024 | ALMENT |
| Mál nr. 76/2023 – Fìggjarætlan 2024 – Roðin | ALMENT |
| Mál nr. 77/2023 – | AFTURLATIÐ |
| Mál nr. 78/2023 – | AFTURLATIÐ |
| Mál nr. 79/2023 – | AFTURLATIÐ |
| Mál nr. 80/2023 – Stuðul til Rescue Lív | ALMENT |
| Mál nr. 81/2023 – Umsókn um uppískoytisstykki | ALMENT |
| Mál nr. 82/2023 – Umsókn um uppískoytisstykki | ALMENT |

**Mál nr. 74/2023 – Eykajáttan til Heygsveg 2. viðgerð** **ALMENT**

J.nr.: 1201-5-2021

Í samband við liðugtgerð av Heygsvegi eru meirveitingar, sum hevur við sær, at peningur kemur at vanta á stovninum "Vegur íløga". Sambært roknskaparleiðaranum er talan um kr. 901.795.

**Á fundi, tann 22.08.2023, mælir Fíggjarnevndin til at játta kr. 901.795 eyka í samband við Heygsveg til stovnin "Vegur íløga". Peningurin verður tikin av tøkum peningi.**

**Tilmælið frá Fíggjarnevndini varð einmælt samtykt.**

**Á fundi, tann 22.09.2023, mælir Fíggjarnevndin til við 2. viðgerð, at játta kr. 901.795 eyka í samband við Heygsveg til stovnin "Vegur íløga". Peningurin verður tikin av tøkum peningi.**

**Tilmælið frá Fíggjarnevndini varð einmælt samtykt við 2. viðgerð.**

**Mál nr. 75/2023 – Fíggjarkarmurin hjá Nes kommunu 2024** **ALMENT**

J.nr.: 1107-2-2023

**Ásetan av fíggjarkarmi fyri 2024 hjá Nes kommunu**

| | | 2024 | | 2023 v/eykaj. | | Munur |
|---|---|---|---|---|---|---|
| §20 Kommunuskattur | tkr. | 64.258 | tkr. | 58.600 | tkr. | 5.658 |
| §20 Húsaleiguskattur | tkr. | 5 | tkr. | 5 | tkr. | 0 |
| §20 Felagsskattur | tkr. | 1.000 | tkr. | 1.000 | tkr. | 0 |
| §20 Eftirlønargjøld | tkr. | 13.619 | tkr. | 12.195 | tkr. | 1.424 |
| §20 Dis, Fas v.m. | tkr. | 2.826 | tkr. | 2.534 | tkr. | 292 |
| **Inntøkur í alt** | **tkr.** | **81.708** | **tkr.** | **74.334** | **tkr.** | **7.374** |
| | | | | | | |
| §1 Kommunal Fyrisiting | tkr. | 6.955 | tkr. | 5.024 | tkr. | 1.931 |
| §2 Almanna- og heilsumál | tkr. | 24.940 | tkr. | 22.584 | tkr. | 2.356 |
| §3 Børn og ung | tkr. | 15.308 | tkr. | 14.499 | tkr. | 809 |
| §4 Undirvísing | tkr. | 5.598 | tkr. | 5.274 | tkr. | 324 |
| §5 Mentan og frítíð | tkr. | 5.649 | tkr. | 5.206 | tkr. | 443 |
| §6 Teknisk mál | tkr. | 7.107 | tkr. | 6.722 | tkr. | 385 |
| §7 Kommunal virki | tkr. | 3.986 | tkr. | 4.020 | tkr. | -34 |
| **Rakstur í alt** | **tkr.** | **69.542** | **tkr.** | **63.329** | **tkr.** | **6.213** |
| | | | | | | |
| **Úrslit áðrenn fíggjarkostnað** | **tkr.** | **12.166** | **tkr.** | **11.005** | **tkr.** | **1.161** |

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| §20 Rentustuðul | tkr. | 2.000 | tkr. | 1.000 | tkr. | 1.000 |
| §20 Rentuútreiðslur | tkr. | 838 | tkr. | 797 | tkr. | 41 |
| **Fíggjarkostnaður í alt** | **tkr.** | **2.838** | **tkr.** | **1.797** | **tkr.** | **1.041** |
| | | | | | | |
| **Úrslit áðrenn avdrøg og íløgur** | **tkr.** | **9.328** | **tkr.** | **9.208** | **tkr.** | **121** |

**Fyritreytir og viðmerkingar til tølini omanfyri**

- Skattaprosentið er sett til 20,5%.
- Skattainntøkan er sett eftir fyribilsmeting frá Taks.
- Eftirlønargjøldini og Dis, Fas v.m. er sett eftir fyribilsmeting frá FMR.
- Kostnaðurin til Roðan er eftir fyribils fíggjarætlan hjá Roðanum.
- Í barnagarðinum verða 4 vøggustovur og 4 barnagarðsstovur í 2024. Í vøggustovuni er normeringin 11 tímar pr. barn og í barnagarðinum 6 tímar pr. barn
- Skúlabólkurin er í Frítíðarskúlan.
- Barnafrádrátturin er broytur til kr. 6.000.
- Ansingargjøldini eru eins og undanfarna ár kr. 2.200, kr. 1.900 og kr. 1.000.
- Øll havnagjøld og onnur gjøld eru eins og undanfarna ár.

**Á fundi, tann 22.09.2023, mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við fíggjarkarminum fyri 2024, so sum hann er uppsettur omanfyri.**

**Tilmælið hjá Fíggjarnevndini varð einmælt samtykt.**

**Mál nr. 76/2023 – Fíggjarætlan 2024 – Roðin ALMENT**

J.nr.: 1105-6-2023

Fíggjarætlanin hjá Roðanum er komin til ummælis hjá Nes kommunu. Við fólkatalinum pr. 01.09.2023 sum grundarlag eru 220 borgarar, sum eru 67+ í Nes kommunu svarandi til 21% og kr. 20.055.515 at fíggja hjá Nes kommunu.

**Á fundi, tann 22.09.2023, mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við fíggjarætlanini hjá Roðanum 2024, soleiðis sum hon er uppsett.**

**Tilmælið hjá Fíggjarnevndini varð einmælt samtykt.**

# Býráðsfundur 25.09.2023

**Mál nr. 80/2023 – Stuðul til Rescue Lív** **ALMENT**

J.nr.: 2001-7-2023

Í umsókn, dagfest tann 14.08.2023, søkir Havnar Bjargingarfelag um fíggjarligan stuðul til at uppstiga og umvæla bjargingarbátin Rescue Lív.

Havnar Bjargingarfelag varðar av Rescue Lív sum fer út til 30-40 útkall árliga. Serliga eru tað bátar, sum eru komnir illa fyri, men eisini kann talan verða um sjúkraflutning, leiting o.a. Víst verður á, at talan kann verða um útkall frá øllum landinum, og tí verða kommunurnar søktar um stuðul.

Raksturin liggur í tryggari legu, og tí er tað bert til umvælingina, sum stuðul verður søktur til.Tað verður ikki søkt um nakra ávísa upphædd og víst verður á, at alt munar.

**Á fundi tann 16.08.2023 mælir Tekniska nevnd til at arbeiða víðari við málinum.**

**Á fundi tann 21.09.2023 mælir Tekniska nevnd til at stuðla við kr. 10.000.**

**Á fundi, tann 22.09.2023, mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við tilmælinum hjá Teknisku nevnd og at fíggingin verður tikin av stovninum “Aðrar kommunalar útreiðslur”.**

**Tilmælini hjá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini vórðu einmælt samtykt.**

**Mál nr. 81/2023 – Umsókn um uppískoytisstykki – Høgni Hansen** **ALMENT**

J.nr.: 1205-7-2023

Í telduposti, tann 04.09.2023, søkir Høgni Hansen um uppískoytisstykki. Hann hevur keypt innastu randarhúsini undir Høganesi og ynskir at hava møguleika at gera eina gøtu, so at tað ber til at fáa atgongd til ovaru hæddina við koyristóli.

Ástaðarfundur hevur verið, og tekniski leiðarin mælir til at játta umsóknini um ískoystisstykki.
Greiðast er flyta markið norðeftir (alt sum tað er) umleið 4,5m longur norð – ið gevur ískoytisstykkinum eina vídd á uml. 100m², ið skal lutast burturav matr. nr. 267e, ið er ogn hjá Nes kommunu.

**Á fundi tann 21.09.2023 mælir Tekniska nevnd til at loyva uppískoytisstykkinum sambært viðlagda korti.**

**Tilmælið hjá Teknisku nevnd varð einmælt samtykt.**

# Býráðsfundur 25.09.2023

**Mál nr. 82/2023 – Umsókn um uppískoytisstykki – Siri & Rógvi Hansen ALMENT**

J.nr.: 1205-8-2023

Í telduposti, tann 04.09.2023, søkir Rógvi Hansen um uppískoytistykki burtur av matr. nr. 306a at leggja uppí hansara matr. nr. 320. Talan eru um uml. 60 $m^2$.

Umsøkjarin ger vart við, at tey hava í nógv ár brúkt part av matr. 306a og ynskja at fáa ognarviðurskiftini í rættlag.

Grundað á viðurskiftini í økinum, soleiðis sum markini í ovara borð eru háttað, sær tekniski leiðarin onga forðing í at loyva hesum keypi.
Við støði í nýggja markinum í ovara borð fyri matr. nr. 319 í Saltnesi, ið frammanundan hevur fingið játtandi svar uppá líknandi umsókn um ískoytisstykkið, verður mælt til at ganga umsóknini á møti.

Talan er um umleið 110$m^2$.

**Á fundi tann 21.09.2023 mælir Tekniska nevnd til at loyva uppískoytisstykki sambært viðlagda korti.**

**Tilmæli hjá Teknisku nevnd varð einmælt samtykt.**